# bróður*)



Vit hava nógv at læra av menningini á Akureyri, her ikki minst nýggja Háskúlanum







fyritøkum fyri læntar pengar kann skjótt fara at ridla. Men tað varandi virði í háskúlunum og granskingini er tað, ið vit eina helst eiga at taka til okkara.

## Greiddi eg honum frá...

Her heima hjá okkum uppliva vit, at frøðingar mæla frá at brúka for nógv uppá gransking og hægri útbúgving. Onkur helt, at fær føroyskur ungdómur bara miðnámshúgvuna á høvdið, ja so eru útbúgvingar um allan heim algongdar og slottið vunnið.

Hetta er eftir míni fatan skeivt av so mongum orsøkum. Av teimum ungu, ið lósu hjá mær, høvdu tey nógvu maka og børn. Samanbera vit við føroyingar, so er tað mangan, at drongur fer til Danmarkar og eftir fleiri ára lesnað hittir hann gentu, sum júst er komin niður, og tá hon einaferð er liðug, eru børnini farin í skúla, og so er ikki vist at tað liggur so væl fyri at flyta heim aftur. Akureyri hevur tryggjað sær bæði at fleiri koma norð aftur og at Akureyri varðveitir fleiri ung og bráðræsin fólk.

Eitt er hesin fyrimunurin at varðveita størri part av ungdóminum ella at fáa hann fyrr heimaftur, tí tað ber til at gera eina útbúgving byrjaða í Reykjavík lidna á Akureyri. Annað er at lærdi háskúlin gevur mong arbeiðspláss bæði til lærd og leik, og at háskúlin skapar tað umhvøvið, ið gransking og menning tørva. Um tað er vinnugransking og menning ella ‘grundforskning’ ella gransking fyri tað almenna og stovnar av ymsum slagi, so krevur tað eitt vist umhvørvi og eina vissa mongd ella stødd at fáa tær granskandi ketureaktiónirnar í gongd og at halda fram.

Harumframt kemur, at hægri útbúgvingar aðrastaðni ofta eru somikið vánaligar ella ov nógv rættaðar ímóti heilt ávísum viðurskiftum har á staðnum - danska cand. jur. rennur mær til hugs - at vit eisini kundu tryggja ungdómi okkara rætt og slætt betri útbúgvingar við at lata tey lesa í øllum førum part av útbúgvingini heima hjá okkum sjálvum. Ikki minst er hetta eyðvitað, tá føroysk lesandi skriva ritgerðir um føroysk viðurskifti - tá var so upplagt at verið heima og havt føroyskan vegleiðara ella enntá gjørt kanning fyri ein føroyskan stovn, ið hevur brúk fyri kanningini. Men sum er, eru vit í Føroyum so besett av reglugerðum, mannagongdum, játtanarskipanum og freistum, at nærum onki slíkt fæst í lag.

Tað er sera vandamikið og sera harmiligt, at vit sum onki kunnu finna milliónir til rakstrarstudning ella til íløgur í betong og boring, men ikki duga at gera íløgur í vinnur innan vitan og mentan.

## ...mangan víst mær á beinasta veg

Nú skal ikki verða sagt, at alt ljós í útnorði liggur. Á norrønum fundi herfyri í Søderborg á oynni Als í Suðurjútlandi greiddi danski tingmaðurin Frode Sørensen frá, hvussu tey har í danska útjaðaranum hava samskipað ymsa hægri útbúgving og hava skapt fróðskaparsetursumhvørvi, ið er vorðin vinna, ið loysir av eldri og lágløntari vinnur. Allastaðni, har teimum eydnast at varðveita ella menna útjaðaran í norðanlondum tykjast gransking, útbúgving, menning og samskipan av hesum tættum at vera so ógvuliga týðandi.

Føroyar áttu at lært av norrønu systkjum sínum og gingið henda sama vegin við samanleggingum av hægri skúlum, við granskingardeplum, við minni umsiting og færri reglugerðum, meiri samvinnu millum stovnar, vinnulív og gransking, og við at rætta gransking og menning ímóti tí, sum tørvur er á, heldur enn ímóti tí, sum lærararnir frammanundan duga ella plaga.

Við at lata upp gluggarnar í allar ættir kunnu vit uppliva ein so nógv bjartari dag.

*) Sangur eftir Símun av Skarði, nr. 470 í Føroya Fólks